# Tiltak hjá ÍSB í vanda

**Hóast milliónir og milliardir rulla ígjøgnum Løgtingið í løtuni, er eitt norðurlendsk tiltak hjá ÍSB í vanda, tí 100.000 krónur, sum felagið hevur biðið Mentamálaráðið um at fáa játtað á fíggjarlógini, ikki eru at finna á fíggjarlógaruppskotinum**

STUÐUL
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Síðani 1980 hevur ÍSB verið limur í norðurlendska samstarvinum, Nord HIF, ið londini skiftast um at hava leiðsluna av. Nakrar ferðir hesi árini hevur staðið Føroyum í boði at taka við norðurlendskuskrivstovuni, men ÍSB hevur borið seg undan orsakað av vantandi umsitingarligum royndum.

Nú stóð aftur ÍSB í boði at leiða hendan partin av norðurlendska samstarvinum. Tí setti felagið seg í samband við Mentamálaráðið at greiða frá støðuni og boðaði frá, at neyðugt var við 100.000 krónur til eitt hálvtíðarstarv í hesum sambandi.

Í einum brævi til Løgtingsins fíggjarnevnd ger ÍSB greitt, at Mentamálaráðið vildi gera alt fyri at fáa upphæddina við í fíggjarlógina fyri 2008.

- Vit vórðu sera væl móttikin í Mentamálaráðnum og fingu ta fatan, at tað mundi fara at ganga, skrivar ÍSB til fíggjarnevndina.

Men á fíggjarlógaruppskotinum stendur ikki eitt oyra til endamálið.

- Tað harmar okkum tí almikið enn einaferð at fara neyðarsliguogeyðmýkjandi gongdina til grannar okkara og siga, at í Føroyum er eingin vilji til at seta neyðuga peningin av á landsins fíggjarlóg til eitt sjálvsagt norðurlendskt mál teimum brekaðu at frama. Vit senda bara drunnin víðari og siga, sum vit plaga, at vit eru so fá og smá. Er hetta ikki skomm fyri okkum føroyingar bara at spæla við, men ikki gjalda gildið?, spyr ÍSB fíggjarnevndina hjá Løgtinginum.



*ÍSB hevur sagt ja til at átaka sær eina norðurlendska skrivstovu, ið gongur upp á skift millum brekað-sambondini í norðurlondum, og hevði fingið greiðar ábendingar um, at Mentamálaráðið fór at stuðla hesum við 100.000 krónum. Kortini er ikki eitt oyra at finna á fíggjarlógaruppskotinum, sum er til viðgerðar í Løgtinginum løtuni*

*Savnsmynd*

## Standa spyjandi

Eftir jaliga svarið frá Mentamálaráðnum boðaði ÍSB frá á fundi í Nord HIF, sum varð hildin í Finlandi í august í ár, har endaliga avgerðin skuldi falla, at tey tóku av tilboðnum um at standa fyri norðurlendsku skrivstovuni.

- Men nú standa vit spyrjandi. Verður kortini neyðugt at fara til grannarnar fyri vestan og heita á teir um at taka á seg ábyrgdina, sum annars varð løgd á okkum. Vit vóna tað ikki. Tí heita vit inniliga á tykkum í fíggjarnevndini um at fáa skipað so fyri, at 100.000 krónur til nevnda endamál kemur við í fíggjarlógina, sum tit hava til viðgerðar í løtuni, skrivar ÍSB til fíggjarnevndina.

Sosialurin hevur spurt Anfinn Kalsberg, formann í fíggjarnevndini, um peningurin verður játtaður.

- Tað kann eg ikki siga nakað ítøkiligt um í løtuni. Vit fundast í løtuni um alla fíggjarlógina, og allar slíkar áheitanir verða sjálvandi viðgjørdar so hvørt, sigur Anfinn Kallsberg.

Sosialurin royndi at fáa eina viðmerking frá landsstýrismanninum í mentamálum, Jógvani á Lakjuni, um hví peningurin ikki er at finna á fíggjarlógaruppskotinum, men hann var ikki at hitta, tí hann sat upptikin á fundi.


## KT-fólk til FT Samskifti

"Tað finnast nógv fyribrygdi, sum ein má vera serfrøðingur fyri ikki at skilja"

- Hjalmar Søderberg -



Føroya Tele virkar á einum liberalisaðum telemarknaði, har alt fleiri tænastur og veitingar standa kundunum í boði.

Til Vinnutøkni, sum fæst við tøkniliga partin av samskiftisloysnunum til vinnukundar okkara, søkja vit eftir einum KT-fólki at menna og halda viðlíka KT-partin av hesum arbeiði.

Í starvinum eru nógvar, nýggjar avbjóðingar. Arbeitt verður í einum spennandi og broytiligum umhvørvi saman við dugnaligum starvsfelagum, har vit leggja dent á gott samstarv. Uppgávurnar eru bæði innanhýsis og mótvegis kundum og fevna í høvuðsheitum um hesi øki: Rakstur og viðlíkahald, stuðul hjá kundarøkt (2nd line support), produktmenning og verkætlanarleiðsla.

**Høvuðsábyrgdarøkið er samskiftisloysnir, herundir:**
- VoIP
- Netverk og kravfestan
- tráðleyst IP
- mannagongdir við serligum atliti til Trygd

**Tað er ein fyrimunur, um umsøkjari:**
- dugir at arbeiða sjávstøðugt og at taka ábyrgd
- er nærløgd/-lagdur og samstarvsfús/- ur
- er fyrikomandi og dugir at tosa við kundar
- kann samskifta á enskum í skrift og talu
- hevur kunnleika ella royndir innan netloysnir
- er KT-verkfrøðingur ella hevur eina aðra viðkomandi tekniska útbúgving og/ella royndir við samskiftistøkni

Neyðug upplæring fer fram sum síðumanslæra og við neyðugum skeiðum.

Meira fæst at vita um starvið frá Árni Joensen tel 303361 ella frá Starvsfólkadeildini á Føroya Tele.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Tele og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir við avriti av prógvum, møguligum ummælum og CV skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 10. des 2007.

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*

FT Samskifti er dótturfelag í Føroya Tele. Í felagnum er øll kundarøkt, øll søla og alt samskifti við privat- og vinnukundar, alt GSM-samskifti og øll støðarútgerð fyri fastnettelefoni og breiðbandi. Í felagnum starvast 115 fólk. Tænastur frá FT Samskifti verða marknaðarførdar undir navninum Føroya Tele.